# Mentón farið undir arbeiðið

**Formaðurin í Mentón, Heðin Ziska Davidsen, hevur nú brotið upp um armar, og er farin til verka, fyri at skaffa tónleikarum í Havnini venjingarhøli og eitt spælistað. Og hann heldur ikki, at tað sær svart út**

TÓNLEIKUR
*Eydna Skaale*
*Eydna@sosialurin.fo*



*Herfyri hevði Mentón fund í Norðurlandahúsinum. Felagið er nú veruliga farið undir arbeiðið at finna venjingarhøli og spælistað til tónleikararnar í Havnini*

Til stovnandi aðalfundin, sum varð hildin 6. mars, vóru nógvir politikarar møttir upp at hoyra hvat ið Mentón í grundini ætlaði sær.

– Vit hava sum so ikki hoyrt nakað aftur frá teimum síðani fundin, sigur Heðin Ziska Davidsen, – men onkur av teimum segði, at teir bert fóru at bíða eftir fyrsta útspælinum frá okkum. Tað eru tó hend ymisk ting á økinum, hóast politikararnir ikki hava verið í beinleiðis sambandi við okkum, sigur hann.

Arbeiðið fyri at útvega spælistøð er byrjað. Herfyri varð nevniliga samtykt í løgtinginum at fáa spælistøð til tónleikararnar kring landið. Ábyrgdin av at fáa hølini til vega verður løgd út á kommunurnar.

– Sjálvsagt er tað fantastiska gott, men tað, sum tykist vera tað torførasta hjá fólki at skilja, er, at tað er stórur munur á venjingarhølum og spælistøðum. Vit arbeiða fyri báðum, men serliga spælistaðið hevur stóran prioritet, sigur Heðin.

## Farin undir leitingararbeiðið

– Vit hava leitað eftir bygningum í Havnini, men higartil hevur tað verið uttan úrslit, sigur formaðurin í Mentón, Heðin Ziska Davidsen.

– Vit hoyrdu einaferð, at reinsaríið skuldi nýtast til mentanarlig tiltøk, m.a. tónleik, men stutt aftaná hoyrdu vit, at ætlanin var broytt til, at reinsaríið skuldi nýtast til ungdómshús í staðin. Uppaftur seinni hoyrdu vit so, at eingin støða var tikin í málinum. Tá fóru vit og hugdu at bygninginum við einum arkitekti og einum byggifrøðingi, og teir staðfestu tíanverri, at húsið tað sama kundi rívast niður, tí tað er í so vánaligum standi. So tann ætlanin bleiv slept.

– Tað næsta vit gjørdu, var at seta okkum niður og gera eina skitsu av, hvussu eitt spælistað ella eitt konserthús skal síggja út og hvørjir hentleikar mugu vera har. T.d. má tað vera ein salur við einum palli og nokk av plássi til áhoyrararnar. Har má vera ein café tengd at, men hon kann ikki vera inni í sjálvum salinum, tí tað forstýrar ótrúliga illa við kassaapparatinum, cappucchinomaskinum o.t. tá tú spælir. Forholdið millum pall, sal og borð og stólar má eisini vera í lagið. Tað er alneyðugt, at tað er gott pláss aftanfyri pallin, so tónleikararnir fáa havt síni ljóðføri har. Tað er sum so tað, sum vit arbeiða við í løtuni, sigur Heðin.

Ætlanin er, at fáa eina so góða meting sum gjørligt, sum so verður handað kommununi til eftirtektar. Heðin sigur, at eftirsum tað nú er álagt kommununi at skaffa eitt spælistað til tónleikararnar, er alneyðugt at fáa eitt gott samstarv í lag.

– Vit royna at arbeiða hart og gera eitt so gott kunningararbeiði sum gjørligt, sigur Heðin. Um kommunan veruliga veit hvat tað er, vit ynskja okkum, so veksur tað um møguleikan at vit fáa júst tað. Ein vandi við løgtingssamtyktini er tann, at kommunan bert kroystir eitthvørt høli yvir høvdið á okkum, fyri at fylgja boðunum úr tinginum. Sannlíkindi eru tá fyri, at hølini als ikki kunnu nýtast til endamálið. Tað er hent fyrr. Tí fara vit í næstum at taka upp tætt samstarv við Tórshavnar kommunu.

## Er nakar tørvur á Mentón?

Áðrenn Mentón varð stovnað, vóru longu ein rúgva av tónleikasamtøkum í landinum. T.d. kunnu nevnast Grót, Tutl og FUT. Akkurát hvat er tað, sum Mentón ætlar sær, sum hini feløgini ikki megna?

– Okkara aðalmál er at fáa spælistøð til tónleikararnar í Havnini. Har er størsti munurin. Vit hava eitt tætt samstarv við Grót í Gøtu, og tað var faktiskt eftir ráðum frá teimum at Mentón varð stovnað. Teir høvdu ikki orku til at taka okkum undir veingirnar eisini, teir hava jú úr at gera við tónleikalívinum í Gøtu og teir ynsktu sær ein samstarvspartnara í Havnini. Okkara reglugerð er bygd á teirra, tó við nøkrum broytingum. Vit fundast eisini regluliga annað hvønn mána.

– FUT kann ikki ordiliga samanberast við okkum, tí teir arbeiða fyri heilt øðrum søkum enn spælistøðum. So ja, eg haldi tað var tørvur á einum felagi sum hesum, sigur Heðin Ziska Davidsen.

Hann greiðir somuleiðis frá at Vinnuhúsið og Menningarstovan hava biðið Urd Johannesen um at gera eina støðulýsing av tónleikinum í Føroyum.

– Men tað er ein so víðfevnandi uppgáva, at hon hevur kókað tað niður til at gera eina støðulýsing av rútmiska tónleikinum í Føroyum. Tá hennara frágreiðing kemur, síggja vit akkurát hvussu støðan er og hvussu hon kann bøtast. So tá fáa vit at síggja um tað er tørvur á arbeiðnum hjá Mentón, sigur Heðin. Og hann ljóðar ógvuliga vísur í, hvat úrslitið av kanningini fer at verða.

– Vit hava upp ímóti 100 limum nú, og vit ætla okkum undir eitt tiltak, har vit fáa allar tónleikararnar í Havnini at tekna seg sum lim hjá okkum. Vit síggja veruliga bjart uppá tað, annars høvdu vit ikki orkað at farið undir hetta arbeiðið.

Hann torir tó ikki at siga nakað um, nær vit fara at sleppa til konsertir í nýggja spælistaðnum í Havnini.



*Aðalendamálið hjá Mentón er at fáa eitt stað í Havnini, har bólkar kunnu spæla fyri áhoyrarum undir góðum umstøðum*

# Tryggingin móttøku í nýggju hølunum



*Umleið 100 fólk skulu starvast í nýggju hølunum á Kongabrúnni. Móttøkan verður hósdagin kl. 15.00*

**Í langa tíð hevur verið umbygt og renoverað niðri á Kongabrúnni, men nú er arbeiðið endiliga liðugt. Almenn móttøka verður í nýggju hølunum hósdagin 13. mei, har møguleiki verður at síggja úrslitið av umbyggingini. Har verður bæði tónleikur og ábit á skránni**

MÓTTØKA
*Eydna Skaale*
*Eydna@sosialurin.fo*

Fýra av gomlu bygningunum á kongabrúnni eru nú samanbygdir, og har skulu umleið 100 starvsfólk hjá Tryggingafelagnum Føroyar nú húsast. Teir fýra bygningarnir, sum nú eru komnir undir eitt tak, eru Rosenborg, Arge-bygningurin, kamar-bygningurin og Geilin. Leingi hevur verið arbeitt við samanbyggingini, og hósdagin 13 mei verður so móttøkan.

Tað er ikki smávegis, sum verður gjørt burturúr, nú bygningurin verður sýndur fram fyri viðskiftafólkinum.

Móttøkan byrjar kl. 15 hósdagin, tá høvi verður at síggja hølini og fáa sær ein bita. Edward Nyholm Debess og Finnur Hansen fara tá at spæla nøkur løg við vælkomsttónleiki.

Kl 15.45 verður tónleikastílurin broyttur nakað, tá Johannes Andreasen og Sámal Petersen fara at framføra klassisk verk.

Kl 16.05 fer Gunnar í Liða, forstjóri, at halda eina stutta røðu.

Kl 16.15 er tað dupultkvartettin í Ebenezer, sum fer at syngja sálmar og sangir.

Kl 16.35 verða tað tey úr sangleikinum Jósef og ótruliga litfagra dreymakotið sum sleppa framat. Tey skulu framføra brot úr leikinum.

Móttøkan endar kl 17.30, og tá skuldu øll sum leggja í, havt fingið eina góða uppliving. Bæði tónleikaliga og visuella.



## NØVN Í VIKUNI

Telefon 341800 - Fax 341801 - Fartelefon 216135
e-mail: maggi@sosialurin.fo

Á hesum síðum bera vit tíðindi um merkisdagar, so sum rundar føðingardagar, brúdleypsdagar, starvssetanir o.t.

# Bretski sendiharrin hitti bretar og bretskar vinir

**Dýra biðidag kom bretski sendiharrin í Danmark, Sir Nicholas Browne, saman við konuni, á vitjan í Føroyum. Mánadagin 10. mai var móttøka í Listaskálanum, har høvi var hjá sendiharrahjúnunum at hitta bretar og bretskar vinir í Føroyum**

Sir Nicholas Browne er 56 ára gamal og var útbúgvin við Cheltenham College i Oxford. Hann hevur arbeitt hjá bretska uttanríkisráðnum síðan 1969.

Hann hevur arbeitt í nógvum ymiskum londum bæði sum serfrøðingur í uttanríkismálaráðnum í London og sum bretskur ambassadørur kring allan heim.

Í september 2003 tók hann við sum bretskur sendiharri í Danmark, og var hetta hansara fyrsta vitjan í Føroyum. Umframt at hitta landsins myndugleikar nýtti hann eisini høvið at hitta bretar og bretskar vinir í Føroyum við eina móttøku í Listaskálanum seinasta mánadag.



*Bretski sendiharrin í Danmark, Sir Nicholas Browne, hitti bretar og bretskar vinir í Føroyum í Listaskálanum. Maðurin til vinstru er Regin Hammer*
*Mynd: Jens Kristian Vang*



*Eigil Hansen og konan hitta bretsku sendiharrafrúuna*
*Mynd: Jens Kristian Vang*



*Sir Nicholas Browne saman við Kristian Black og bretska konsulinum í Føroyum, Tummas Hanus Dam*
*Mynd: Jens Kristian Vang*

Fyri 30 árum síðan:

# Froskmenn svumu kapp um Nólsoyarfjørð í 1974

**11. mai 1974 skipaði Landsfelag Føroyska Froskmanna fyri kappsvimjing um Nólsoyarfjørð. Av tí at líkindini ikki vóru av teimum bestu hendan dagin, vóru bert 6 luttakarar**

Byrjað varð úti í Nólsoy, og svomið varð inn til Molan á Eystaru Bryggju í Havn.

Vinnari av kappingini varð Birgir Enni úr Suðuroyar Froskmannafelag, hann brúkti 1 tíma og 25 min. og 15 sek. um teinin, og var tað nýtt met. Nr. 2 varð Hermann Eysturoy úr TF, nr. 3 varð Jonhard Hansen úr EyF, nr. 4 varð Knud Bjørk úr TF, nr. 5 var Harald Petersen úr EyF, og nr. 6 varð Leif Aalykke úr VF.

*Kelda: Myndaárbókin- árið ið fór 1974*



*Vinnarin av svimjikappingini varð Birgir Enni (h.m.) og nummar 2 var Hermann Eysturoy (v.m.) Millum teir sæst havnarmaðurin Villy Hansen*

## Dagurin

**13. mai. Ingenuus**. Rómverskur kristin hermaður, sum keisarin Decius læt drepa.